# Høgni endurvann ovastu rók

Just Dig hjá Høgni Lisberg megnaði eftir 3 vikur á listanum at taka ovasta plássið á 15 teimum bestu. Fyri tveimum vikum síðan tók Pink ovastu rók frá Høgna, ið við lagnum Learn To Ride On Waves hevði ligið fimm vikur ovast. Men nú er Høgni aftur ovast.

Filthy tongue hjá Makrel er næsta føroyska lagið á listanum á fimta plássi, Droymi mitt um dagin hjá Poppkorn er á áttanda plássi, Fremmandur hjá Peturi Pólsyni er á ellinta plássi, beint framman fyri Backyard Traffic hjá Róki. Fimta føroyska lagið á listanum er Cyberspace hjá Villmonnum, ið júst megnar at halda seg innið á fimtanda plássi.

**nud**

# Malagrót til føroyska lurtaran

**Nakað av tí besta innan føroyskan rokktónleik er savnað á fløguni Malagrót, ið ein bólkur í verkætlanini Ungt Virki á Føroya Handilsskúla gevur út. Fløgan tekur tráðin upp eftir Rock í Føroyum og Grót Føroyskt verkætlaninum**



*Højgaard hevur málað málningin, ið prýðir fløguhúsan, ið Sp/f Garasjan hevur sniðgivið og framleitt*

FLØGUÚTGÁVA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Malagrót eitur nýggja savnsfløgan, ið er komin í handlarnar. Fløgan er eitt av úrslitunum av fráliku verkætlanini Ungt Virki, ið Handilsskúlin skipar fyri. Fýra av teimum ungu valdu at geva eina fløgu út, við nøkrum av bestu rokkbólkunum og einstaklingunum í Føroyum.

14 løg eru á fløguni, nøkur eru útgivin frammanundan, meðan onnur ikki eru útgivin áður. M.a. er hetta fyrstu ferð, at nøkur av sterkastu tónleikanøvnunum í Føroyum eru at hoyra á fløgu. Her kunnu nevnast bólkar sum Side Effect, Sic, Marius og The Dreams.

Spennandi nýggi bólkurin The Story Ends hevur somuleiðis fingið eitt lag á fløguna, eins og royndir bólkar sum 200, Makrel, Týr, Deja Vu og Páll Finnur Páll hava latið løg til endamálið. Tveir av bólkunum, ið luttóku á tí fullkomnu føroysku undirgrundsfløguni Ampaljóð, eru eisini við her, Lama Sea, ið teljast millum bestu føroysku bólkarnar í løtuni, og garrvillu 48 Pages.

Heiðrikur á Heygum er uttan iva friðarligasta innslagið á fløguni, við sínum vakra lagi Vetrargestur, ið er fyrsta lag á fløguni. Hin einstaklingurin á fløguni, René Bischoff, eigur seinasta lagið á henni, Kettan.

Vinningurin av fløguni fer til arbeiðið við at menna føroyskan tónleik.

**Løgini eru hesi:**

Heiðrikur á Heygum – Vetrargestur
Lama Sea – The Bastard
The Story Ends - Dancing around Honululu
48 Pages – We People
Marius – Straight Lines
The Dreams – I'll be There
Sic – Reach Inside
200 – Frustreraðir Javnaðarmenn
Týr – Rainbow Warrior
Makrel – On Toes
Páll Finnur Páll – Rasputin
Deja Vu – Reckless
Side Effect – Kaos
René Bischoff – Kettan



*Kamarkórið Atlantic Voices avmyndað í Fuglafjarðar kirkju síðsta leygardag: Frits Johannesen, kórleiðari, Theodor Erling Johannesen, Heri Joensen, Hans Erland í Brekkum, Herfinnur Árnafjall, tenor, Eyðun á Lakjuni, Kristian Petersen, Niels Midjord, Dávur Winther, Heðin Kambsdal, bass, Morid Simonsen, Andrea Eldevig, Eilin Hansen, Ingibjørg Abrahamsen, sopran, Mimi Steintórsdóttir, Kristina Joensen, alt, Marta á Lakjuni, sopran, Gudny Vang, Fríðgerð Ellefsen og Elspa Samuelsen, alt*

# Syngja framman fyri tíggju milliónum amerikanarum

**Kamarkórið hjá Frits Johannesen skal 2. páskamorgun syngja í morgunsendingini Good Morning America, ið sigst hava fleiri enn 10 milliónir hyggjarar**

KÓRFERÐ
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað er ikki hissini fjøld, sum 2. páskamorgun fer at fylgja við, tá ið føroyskt kór á ferð í Amerika fer at framføra.

Mándagin fór kamarkórið Atlantic Voices av landinum. Sama kvøldið høvdu tey konsert í Áskirkjuni í Reykjavík. Í gjár fóru tey úr Keflavík og til New York. Har skulu tey eitt nú syngja í First Moravian Church á Manhattan.

Fyrsta konsertin var á mikudegi mikudagin í Scandinavia Center. Skírisdag halda tey frí. Langa fríggjadag syngja tey í First Moravian Church, og undir hámessuni í norsku kirkjuni páskadag skulu tey syngja fimm sangir. 2. páskamorgun klokkan 6.30 verður kórið við í sjónvarpssendingini Good morning America. Undan fráferðini var tað ikki heilt greitt, men tað er møguleiki fyri, at tey fara at syngja eitt lag a capella. Um so verður, so fara 10 milliónir amerikumenn at síggja og hoyra kórið syngja Nú strýkur vár, sum Tummas Napoleon Djurhuus yrkti, og sum Knút Olsen gjørdi lagið til.

Tað er Frits Johannesen, sum er kórleiðari. Hetta er 15. ferðin, at hann ferðast uttanlands við kóri. Kanska liggur samlaða konserttalið í sambandi við uttanlandsferðirnar um tær hálvt annað hundrað. Leygardagin vóru tvær tær fyrstu konsertirnar á hesi ferðini. Onnur var á Toftum og hin í Fuglafirði, og mánakvøldið sungu tey í Reykjavík.

**Sambandið**

Á heysti í 2004 var Frits Johannesen og vitjaði í New York. Alla halgannadag, sum hetta árið var sunnudagur, var hann í kirkju í First Moravian Church, 154 Lexington Ave at 30th Street. Eftir guðstænastuna kom hann í samband við Dall Wilson, skald og Eliane Componari, cembalist og organist í kirkjuni.

Hetta sambandið var spírin, sum nú hevur borið ta frukt, at føroyskt kamarkór, mannað við 20 sangarum, eftir innbjóðing er í New York á páskum. Flestu sangararnir eru úr Fuglafirði. Frits Johannesen er kórleiðari, og Heðin Kambsdal og Eyðun á Lakjuni hava orgul og klaver fylgisspæl.

Í The First Moravian Church hava tey sungið Hallgrím Pétursonar Passiosálmar við íslendskari siðvenju og á enskum máli. Hetta er orsøkin til, at ein partur av skránni hjá kamarkórinum eru Passiosálmarnir hjá Hallgrimi Péturssyni, sum kórið fer at syngja á føroyskum. Victor Danielsen hevur týtt teir fyrstu 10 sálmarnar, og nakrir av hesum eru á skránni. Ingávlur av Reyni, sáli, hevur so ofta sungið hesar sálmarnar á páskum í Útvarpi Føroya.

Á skránni í New York eru eisini páskaløg, norðurlendsk-, ensk-, inter evropeisk og føroysk løg. Millum tónaskøldini eru Niels Midjord, Frits Johannesen og Eyðun á Lakjuni, sum eru við á ferðini.

Dall Wilson hevur fyrireikað ferðina í New York. Tað er hann, sum hevur syrgt fyri, at kórið skal taka lut í sjónvarpssendingini Good morning America. So er bara at vóna, at amerikumenn snimma 2. páskamorgun fara at hoyra Nú strýkur vár um heimlandsvøll við lýkkutámi millum fjøll; nú fánar fonn og grasið grør, nú vaknar aftur heimlandsjørð.

Kórið verður aftur í Føroyum týsdagin.

Lesið Sosialin so eru tit við